Eysturkommuna

# Fundarinnkalling

## Býráðið

**Dagfesting:** 30.04.2026 kl. 17:00
**Málnr.:**

Nevndarlimir: Per Martin Gregersen
Magnus Skoralíð
Hanna Jensen
Ann Fuglø
Heri Mikálsson
Pól í Skorini
Unn Jarnskor Ellingsgaard
Tórur Didrik Djurhuus
Uni Rasmussen

Varalimir:

Ikki møtt:

Nevndarskrivari:


| **Málsyvirlit** | | | **Síða** |
| --- | --- | --- | --- |
| **Til viðgerð:** | | | |
| 12/26 | 24/00659-4 | Gøtu Húsasøga 2. Frágreiðing og tilmæli | 3 |
| 13/26 | 26/00031-3 | Umsókn um stuðul, Kappróðrarfelagið Tindur 2026. Frágreiðing og tilmæli. | 5 |
| 14/26 | 26/00064-2 | 26/00064 - frágreiðing og tilmæli - Sjóndepilin - Fyrispurningur um stuðul til flutning | 7 |
| 15/26 | 26/00078-1 | Skúlin í Leirvík - matr. nr. 422a - Tangahús og spælipláss | 9 |
| 16/26 | 26/00083-3 | Umsókn um loyvi at keypa ískoytisstykki - Leggja ag aftrat 194a í Leirvík | 13 |
| 17/26 | 26/00112-3 | Tindadagur 2026. Frágreiðing og tilmæli | 15 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 18/26 | 26/00117-4 | Bygdarhúsið 2026. Frágreiðing og tilmæli | 18 |
| 19/26 | 26/00118-3 | Áseting av marki á matr. nr. 19 í Syðrugøtu (Gróvargøta 26) | 20 |
| 20/26 | 26/00120-2 | Umsókn um keyp av ískoytisstykki - Part av matr. nr. 37 í Syðrugøtu | 21 |
| 21/26 | 26/00145-2 | Tónleikasamtakið Grót 2026. Frágreiðing og tilmæli | 23 |
| 22/26 | 26/00169-2 | Leirvíks Páll skótarnir, 2026 | 25 |
| 23/26 | 26/00171-3 | Satspulja 2026. Tvær útgávukoncertir í Eysturkommunu | 26 |
| 24/26 | 26/00185-3 | Satspulja 2026. Tilfar til studiohøli | 27 |
| 25/26 | 26/00186-2 | Rakstrarstuðul, Eysturskot 2026 | 29 |
| 26/26 | 26/00187-2 | Rakstrarstuðul, Eystanljóð 2026 | 30 |
| 27/26 | 26/00188-2 | Rakstrarstuðul, Losjan Glotti 2026 | 32 |
| 28/26 | 26/00225-2 | Eykajáttan apríl 2026 - 26/00225 | 33 |
| 29/26 | 26/00229-2 | Umsókn um byggiloyvi - matr. nr. 120 í Syðrugøtu | 34 |
| 30/26 | 26/00238-1 | Val av hegnsýnisnevnd - 26/00238 | 35 |
| | | | |

**Til viðgerð:**

## 12/26 Gøtu Húsasøga 2. Frágreiðing og tilmæli

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 07.04.2025 | 9/25 | 24/00659-4 |
| 2 Fíggjarnevnd | 28.04.2025 | 17/25 | 24/00659-4 |
| 3 Býráðið | 30.04.2025 | 29/25 | 24/00659-4 |
| 4 Mentanarnevndin | 27.04.2026 | 9/26 | 24/00659-4 |
| 5 Fíggjarnevnd | 28.04.2026 | 12/26 | 24/00659-4 |
| 6 Býráðið | 29.04.2026 | 12/26 | 24/00659-4 |

**Málslýsing:**

Umsókn um stuðul til tær tríggjar bøkurnar um Gøtu húsasøgu, partarnir um Syðrugøtu. Fyrsta bókin kom út í november 2024 og hinar báðar eru ætlaðar í november 2025 og mai 2026. Nógvar lokalar kreftir hava verið og eru partur av hesi verkætlan.

Fígging:
Løn til rithøvunda kr. 300.000
Uppseting og prent av bók 1, 2 og 3 kr. 400.000
Søla av bók 1, 2 og 3 kr. 350.000

Tørv á fígging kr. 350.000

Umbiðin upphædd: 175.000 kr. at lata í trimum reisum.
(Uppskot: des 24, aug 25, jan 26)

Dagføring 20.04.26

Umsøkjarin biður um fígging í trimum reisum og fyrsta reisan er longu avgreitt. Støða skal nú takast til restina av umsóknini og til, um víðari fígging kann/skal játtast.

**Fíggjarligar avleiðingar:**

Á fíggjarætlanini fyri 2025 eru 600.000 kr. settar av til rakstrarkonto 522, “Stuðul til mentan”. Herav eru per d.d. 600.000 kr. tøkar.

**Tilmæli**

**Mentanarnevndin 07. april 2025**
Mentanarnevndin mælir til at stuðla umsóknini við 50.000 kr í hesum umfari. Støða verður tikin til restin av umsóknini í sambandi við fíggjarætlanina fyri 2026.

**Fíggjarnevnd 28. apríl 2025**
Einmælt at taka undir við tilmælinum hjá Mentanarnevndini

**Býráðið 30. apríl 2025**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá Mentanarnevndini og Fíggjarnevndini

**Mentanarnevndin 27. apríl 2026**
Mentanarnevndin mælir til at veita stuðul uppá 38.000 kr.

**Fíggjarnevnd 28. apríl 2026**
Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini

## 13/26 Umsókn um stuðul, Kappróðrarfelagið Tindur 2026. Frágreiðing og tilmæli.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 12.03.2026 | 1/26 | 26/00031-3 |
| 2 Fíggjarnevnd | 28.04.2026 | 9/26 | 26/00031-3 |
| 3 Býráðið | 29.04.2026 | 13/26 | 26/00031-3 |

**Málslýsing:**

Kappróðrarfelagið Tindur søkir eins og undanfarin ár um stuðul.

**Brot úr ársfrágreinðingini:**

- Nýtt fimm-mannafar “Leikalind” í 2018
- Nýtt fimm-mannafar “Knúkur” í 2020
- Nýtt fimm-mannafar “Geytin” í 2022
- Nýtt seks-mannafar “Sjóherji” í 2023
- Nýtt áttamannafarið Tróndur í Gøtu 2023

- Í dag eru +150 limir í felagnum og er veksandi nú vit hava fingið nýggja heimasíðu (Tindur.fo)

Í 2025-26 eru nakrir av felagsins rógvarum við Grandprix kapping í innIróðri, sum eru væl við í kappingini. Nevnast skal, at vit longu hava fleiri manningar, ið venja fram ímóti kappingarárinum 2026

**Mál fyri 2026**
Nevndin er tann sama, og nærkast einum enda við nýggja neystinum sum vit gleða okkum rættuliga nógv til, og at fara at hava alt undir eini lon verður bara super. So nú eru vit í gongd at samla inn til venjingar útgerð

- Arbeiðast skal miðvíst fyri at fáa betri viðurskifti fyri bátar og rógvarar
- Fáa manningar til allar bátarnar, somuleiðis sum undanfarna ár
- FM-heiðursmerkir til minst 2-3 manningar

Karina í Skarði verður venjari í 2026. Hetta tryggjar, at áralag og venjingarlag verður tað sama sum í ár.

Felagið hevur tørv á stuðlum fyri 2026, um grundarlag skal vera fyri at náa málini, sum eru sett til 2026.
Vit skulu eisini viðlíkahalda allar bátarnar, og hetta kemur at vera kostnaðarmikið.
**Ársfrágreiðing og fíggjarstøða**: Síggj viðfest skjøl.

**Umbiðin upphædd:** 150- 200.000 kr.

**Latin stuðul 2022-2025:** 100.000 kr/árið

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Á fíggjarætlanini fyri 2026 eru 650.000 kr. settar av til rakstrarkonto 524, "Stuðul til ítrótt". Herav eru per d.d. 650.000 kr. tøkar |

| **Tilmæli** |
|---|
| |

**Mentanarnevndin 12. mars 2026**
Mentanarnevndin mælir til at stuðla kapproðrarfelagnum við 100.000 kr., nú felagið skal keypa nýggja venjingarútgerð til nýggja kappróðrarneystið. Nevndin mælir til, at stuðulin fer av 524, stuðul til ítrótt.

**Fíggjarnevnd 28. apríl 2026**
Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini

## 14/26 26/00064 - frágreiðing og tilmæli - Sjóndepilin - Fyrispurningur um stuðul til flutning

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin | 25.03.2026 | 3/26 | 26/00064-2 |
| 2 Fíggjarnevnd | 28.04.2026 | 10/26 | 26/00064-2 |
| 3 Býráðið | 29.04.2026 | 14/26 | 26/00064-2 |

**Málslýsing:**

Eysturkommuna hevur fingið ein fyrispurning frá Sjóndeplinum um hvørt Eysturkommuna hevur áhuga og / ella um gjørligt er at veita evt. sjónveikum borgarum úr Eysturkommunu møguleikan fyri at ferðast til tilboðið, ið stovnurin bjóðar – *skrivið/fyrispuringurin er hjálagd/ur.* Aðrar kommunur hava eisini fingið sama fyrispurning.

Lagt verður upp til at talan eru ein ella tveir dagar um vikuna.

Um/tá borgarar úr okkara kommunu so venda sær til Sjóndepilin, og ráðgevingin (visitator) hjá Sjóndeplinum metur, at tey eru skikkað til at gera brúk av tilboðnum, hevði at glett Sjóndepilin at tey kundu kunna borgaran um møguleikan at fáa stuðul til at ferðast til stovnin.

Talan er í stóran mun um pensjonistar, fyritíðarpensjonistar o.a.

Kommunan hevur í sambandi við Sjóndepilin eftir at kommunan hevur móttikið umsóknina og fingið fylgjandi kunning:

Í mun til tilboðið er talan um verkstøð, har ein kann flætta stólar, vev og binda v.m. Eisini er upplestur hvønn týsdag, har ymiskt viðkomandi samfelagsligt verður lisið og onkuntíð er ein framhaldssøga á skránnið. Tað eru “kompitent” fólk (fakfólk), sum standa fyri aktivitetinum á verkstovunum.

Sjóndepilin upplýsir, at talan er í løtuni um eitt fólk frá Eysturkommunu, sum ger brúk at tilboðnum – ein pensjonistur. Viðkomandi hevur avbjóðingar við ferðing. Avvarðandi hjálpa til við koyring og um ikki so verður tikið til Bygdaleiðir, sum ikki er “besta” loysnin fyri ein sjónveikan.

Eysturkommuna hevur verið í samband við Runavíkar kommunu, við fyrispurningi um tað ein ein møguleiki at samskipað eina møguliga koyring. Hetta var Runavíkar kommuna jalig yvirfyri.

**Fíggjarligar avleiðingar:**

Eingin peningur er avsettur á FÆ2026 til nevnda endamál.

**Tilmæli**

Mælt verður til, at Eysturkommuna, kannar møguleikar at samskipa nevnda tilboð um flutning saman við Runavíkar kommunu, og eisini taka aðrar kommunur við um áhugi er fyri hesum og síðan leggja hetta fram fyri politiska myndugleikan, saman við kostnaði, til støðutakan.

**Trivnaðarnevndin 25. mars 2026**
Mælt verður til ikki at ganga umsóknini á møti.

**Fíggjarnevnd 28. apríl 2026**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini.

## 15/26 Skúlin í Leirvík - matr. nr. 422a - Tangahús og spælipláss

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 18.02.2026 | 8/26 | 26/00078-1 |
| 2 Fíggjarnevnd | 23.02.2026 | 2/26 | 26/00078-1 |
| 3 Býráðið | 26.02.2026 | 7/26 | 26/00078-1 |
| 4 Byggi - og býarskipanarnevnd | 22.04.2026 | 14/26 | 26/00078-1 |
| 5 Mentanarnevndin | 27.04.2026 | 29/26 | 26/00078-1 |
| 6 Fíggjarnevnd | 28.04.2026 | 13/26 | 26/00078-1 |
| 7 Býráðið | 29.04.2026 | 15/26 | 26/00078-1 |
| 8 Mentanarnevndin | | | 26/00078-1 |

**Málslýsing:**

Viðv. Tangahúsinum og spæliplássinum í skúlanum í Leirvík, hevur

Tangahúsið:
Tangahúsið varð bygt í sambandi við, at hitaskipanin í skúlanum í Leirvík varð gjørd. Bygningurin varð tó ongantíð gjørdur liðugur, tí hvørki bjálving, klædningur ella tekja vórðu gjørd liðug.

Hetta hevur havt við sær, at bygningurin lekur og hevur sera vánaligt inniumhvørvi. Støðan krevur ábøtur, og mett verður, at neyðugt er at gera bygningin lidnan fyri at tryggja bygningin og inniumhvørvið.

Spælipláss:
Í sambandi við útbyggingina av skúlanum í Leirvík er verandi spælipláss tikið burtur. Nýtt spælipláss er ikki partur av verandi verkætlan, og tí hava næmingarnir í løtuni ikki atgongd til hóskandi spælipláss.

Mett verður, at tað er alneyðugt at fáa skipað eitt nýtt spælipláss, soleiðis at skúlin aftur kann veita næmingunum nøktandi umstøður til spæli og rørslu.

Umsitingin hevur kannað kostnaðin av:
- at gera spælipláss
- at klæða og fullfíggja tangahúsið

Í kostnaðinum fyri spæliplássinum eru fylgjandi leikur íroknað:
- Spælitorn
- Klatriborg
- Reiggja við tveimum setrum
- Reiðurreiggja
- Trampolin
- Hangimotta

Harumframt eru fallundirlag, lendisarbeiði og uppseting íroknað í samlaða kostnaðinum.

| | |
|---|---|
| **Skúlin í Leirvík - Tangahús og spælipláss** | |
| | |
| Tangahús, klæðing, sokkulklæðing, tekja, inndekningar, flag og takrennur | 742.846,00 |
| Mvg 6,25% | 46.427,88 |
| | 789.273,88 |
| Ókendar útr. 10% | 78.927,39 |
| | **868.201,26** |
| | |
| Útgrevstur, planering, fundamentir/sokkul til spæliútgerð | 1.732.219,30 |
| Spæliútgerð incl. Uppseting, fallundirlag og steinlegging | 1.124.934,70 |
| | 2.857.154,00 |
| Mvg 6,25% | 178.572,13 |
| | 3.035.726,13 |
| Ókendar útr. 5% | 151.786,31 |
| | **3.187.512,43** |
| | |
| Tilsamans fyri Tangahús og spælipláss | **4.055.713,69** |

Skjøl:

- Leirvik skole underlag under redskaber
- Leirvík Skole. faldeunderlag under alt
- Inspiration til nye legepladser

**Ískoyti 27.04.2026**
Umsitingin hevur, í samstarvi við leiðsluna á skúlanum í Leirvík, gjøgnumgingið ætlanina fyri nýggja spæliplássið. Í hesum sambandi eru ávísar tillagingar framdar, og leiðslan hevur sett fram ynski um fylgjandi spælutól:

- 2 reiggjur við 2 setrum
- 2 gyngir
- 2 trampolinir
- 1 klatritorn
- 1 klatrivegg
- 1 kurvabóltskurv

Í sambandi við hesar tillagingar verður mett, at lendisarbeiðið økist við umleið 80 metrum, og at fallundirlagið verður víðkað við umleið 40 fermetrum.

Samlaði kostnaðurin fyri hesar broytingar er tilskilaður niðanfyri.

| Skúlin í Leirvík - Spælipláss | |
|---|---|
| Útgrevstur, planering, fundamentir/sokkul til spæliútgerð | 1.732.219,30 |
| Spæliútgerð incl. Uppseting, fallundirlag og steinlegging | 1.372.940,30 |
| | 3.105.159,60 |
| Mvg 6,25% | 194.072,48 |
| | 3.299.232,08 |
| Ókendar útr. 5% | 164.961,60 |
| Tilsamans | **3.464.193,68** |

Í mun til undanfarna tilboð er kostnaðurin hækkaður við 276.681,25 kr.

| Fíggjarligar avleiðingar: |
|---|
| |

| Tilmæli |
|---|
| Umsitingin mælir til, at játta pengar til tangahúsið og spæliplássi í skúlanum í Leirvík.<br><br>**Ískoyti 27.04.2026**<br>Umsitingin mælir til, at játta pengar til spæliplássi í skúlanum í Leirvík við ásettu tillagingunum. |

**Byggi - og býarskipanarnevnd 18. februar 2026**
Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Fíggjarnevnd 23. februar 2026**
Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býaskipanarnevndni. Áðrenn endalig støða verður tikin til ætlanina fyri spæliplássi, skal tað viðgerast av mentanarnevndini og leiðsluni í skúlanum.

**Býráðið 26. februar 2026**
Einmælt samtykt at taka av partinum av tilboðnum sum er til tangahúsið, og játta pening til tað. Málið viðv. spæliplássinum verður beint aftur í avvarandi nevndir til víðari viðgerð.

**Byggi - og býarskipanarnevnd 22. april 2026**
Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum, treyta av at uppskot til fígging fyriliggur.

**Mentanarnevndin 27. apríl 2026**
Mentanarnevndin tekur undir við málinum *um so er,* at skúlaleiðslan og skúlastýrið hevur sæð uppskotið og góðtikið uppskotið.

**Fíggjarnevnd 28. apríl 2026**

Fíggjarnevndin mælir til at verkætlanin verður tillaga soleiðis at kostnaðurin ikki verður hægri enn tær 3. míó. sum eru játtaðar.

## 16/26 Umsókn um loyvi at keypa ískoytisstykki - Leggja ag aftrat 194a í Leirvík

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 18.03.2026 | 11/26 | 26/00083-3 |
| 2 Fíggjarnevnd | 28.04.2026 | 6/26 | 26/00083-3 |
| 3 Býráðið | 29.04.2026 | 16/26 | 26/00083-3 |

**Málslýsing:**

Eysturkommuna hevur móttikið umsókn um keyp av matr. nr. ag í Leirvík, dagfest 10. februar 2026.

Søkt verður um loyvi at keypa matr. nr. ag í Leirvík sum ískoytisstykki til matr. nr. 319 í Leirvík. Matr. nr. ag í Leirvík er áleið 488 fermetrar til støddar.

**Lógir og ásetingar:**

Í kunngerð nr. 122 frá 22. desember 2000 um alment útboð av kommunalari fastogn í § 2, stendur:

**§ 2.** Fastogn nýtist tó ikki at verða boðin alment út, um talan er um

1. sølu til landsmyndugleikar, kommunu ella kommunalan felagsskap, sbr. § 57 í kommunustýrislógini,
2. sølu til felag, stovn v.m., sum kommunan lógliga kann veita stuðul,
3. sølu av økjum, ið eru minni enn 300 $m^2$ til víddar og sum tað ikki sjálvstøðugt kann verða bygt á ella
4. kommunala útstykkingar o.l., har tillutan og prísáseting fara fram eftir frammanundan ásettum reglum.

*Stk. 2.* Við góðkenning frá landsstýrismanninum kann verða vikið frá kravinum um alment útboð í sambandi við makaskifti og tá tað annars eru serlig viðurskifti, ið tala fyri, at fastognin kann verða seld uttan alment útboð.

**Upplýsingar frá umsitingini:**

Ein partur av matr. nr. ag í Leirvík verður nýttur sum vegur og virkar sum atkoma til matr. nr. 437 og matr. nr. 436.
Um kommunan selur allan matr. nr. ag í Leirvík, kann hetta hava við sær, at eigararnir av omanfyri nevndu matriklum missa sína atkomu til ognina. Harumframt vil kommunan ikki hava møguleika at víðka vegin í framtíðini.

Umsitingin hevur tí gjørt eitt uppskot um, hvønn part av matr. nr. ag í Leirvík kann seljast sum ískoytisstykki til matr, nr. 319 í Leirvík. Sambært hesum uppskoti kann ein partur, svarandi til umleið 155 fermetrar, seljast. Sí skjal 26-00083, fylgiskjal 1.

Skjøl í málinum:

- 26-00083 Fylgiskjal 1

| |
|---|
| • Uppískoytisstykkið |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Ongar. |

| **Tilmæli** |
|---|
| Umsitingin mælir til, at selja part av matr. nr. ag í Leirvík svarandi til 155 fermetrar, sum víst á skjal 26-00083 Fylgiskjal 1. |

**<u>Byggi - og býarskipanarnevnd 18. marts 2026</u>**

Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**<u>Fíggjarnevnd 28. apríl 2026</u>**

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

## 17/26 Tindadagur 2026. Frágreiðing og tilmæli

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 27.04.2026 | 12/26 | 26/00112-3 |
| 2 Fíggjarnevnd | 28.04.2026 | 14/26 | 26/00112-3 |
| 3 Býráðið | 29.04.2026 | 17/26 | 26/00112-3 |

**Málslýsing:**

Vit hugsa at skipa fyri Tindadagi, sum seinastu árini. Søkja um stuðul, um veðrið er gott, kann tað geva yvirskot og er ikki gott veður, so verður tað undirskot.

**Efter umbøn um nærri kunning, er henda kunning komin:**
Í ár fer tiltakið ikki at byrja líka tíðliga sum tað hevur gjørt.
Vit ynskja framhaldandi at hava tað bíligt so barnafamiljur ikki skulu hugsa um at tað er ov dýrt at koma.
Á uppgerðini mangla 3000 kr fyri harmoniku spælara.

Umbiðin upphædd: 80.000 kr.

Det sammenkædede billede kan ikke vises. Filen er muligvis blevet flyttet, omdøbt eller slettet. Kontrollér, at linket peger på den korrekte fil og placering.

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Á fíggjarætlanini fyri 2026 eru 400.000 kr. settar av til rakstrarkonto 522, “Stuðul til mentan”.<br>Herav eru per d.d. 400.000 kr. tøkar. |

| **Tilmæli** |
|---|
| |

**Mentanarnevndin 27. apríl 2026**

Mentannarnevndin mælir til at stuðla umsóknini við 40.000 kr., tikin av rakstrarkontoini «Ymisk mentanartiltøk».

**<u>Fíggjarnevnd 28. apríl 2026</u>**
Málið tikið av skrá

# 18/26 Bygdarhúsið 2026. Frágreiðing og tilmæli

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 27.04.2026 | 13/26 | 26/00117-4 |
| 2 Fíggjarnevnd | 28.04.2026 | 15/26 | 26/00117-4 |
| 3 Býráðið | 29.04.2026 | 18/26 | 26/00117-4 |

**Málslýsing:**

Tað eru umvælingar í og uttanum bygdarhúsið sum standa fyri framman og er tað sera tungt fíggjarliga at fara undir.

**Gongdin tey seinastu árini:**
Frá einki virksemi at hava (undir korona) til at verða komin í gongd aftur hevur ikki bara verið lætt, veitslurnar eru ikki so stórar sum fyrr og er tí størri kapping á økinum, serliga tá hugsað verður um útboði av hølum, bæði her í kommununi og sum heild.

Bingo sum verða hildin 2 ferðir um vikuna er gott virksemi, serliga fyri tey eldru, men hetta gevur so lítið avkast í dag, at tað er ein stuðulsaktivivtetur hjá okkum at leiga húsið út til bingo!

Nýggjárshald bleiv hildið og uml 300 fólk vóru til morgunmat og uml 400 til dans o.a. um kvøldið. Hetta tiltak var væl stuðlað, men kundi neppa verið gjørt uttan eitt bygdarhús sum tað vit hava.

Sólarkaffi var nú fyrst í februar og uml 300 fólk vóru til góðan bygdarhugna :)

**Fíggjarligur stuðul:**
Tað kom sera væl við at fáa fíggjarligan stuðul frá Eysturkommunu í fjør og vóna vit at tað kann verða veitt líknandi stuðulsupphædd í ár!
Stuðulsupphæddin vit fingu var brúkt til at uppdaterað teknisku útgerðina, uppvørpur, ljóðanlegg og øll brandútger er nú nýggj!

Umbiðin upphædd: Eingin ítøkilig
2025: 100.000 kr.

**Fíggjarligar avleiðingar:**

Á fíggjarætlanini fyri 2026 eru 400.000 kr. settar av til rakstrarkonto 522, “Stuðul til mentan”. Herav eru per d.d. 400.000 kr. tøkar.

**Tilmæli**

**<u>Mentanarnevndin 27. apríl 2026</u>**
Mentanarnevndin mælir til at stuðla umsóknini við 40.000 kr.

**<u>Fíggjarnevnd 28. apríl 2026</u>**
Fíggjarnevndin mælir til at taka undr við tilmælinum hjá mentnarnevndini.

## 19/26 Áseting av marki á matr. nr. 19 í Syðrugøtu (Gróvargøta 26)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 18.03.2026 | 12/26 | 26/00118-3 |
| 2 Fíggjarnevnd | 28.04.2026 | 7/26 | 26/00118-3 |
| 3 Býráðið | 29.04.2026 | 19/26 | 26/00118-3 |

**Málslýsing:**

Eysturkommuna hevur móttikið áheitan, dagfest 2. mars 2026, um marknaðarumskipan millum matr. nr. 19 og matr. nr. m í Syðrugøta.

Umsøkjarin ynskir, at markið fyri matr. nr. 19 í Syðrugøtu verður rættað, so tað fylgir verandi garði.

Sambært umsóknini merkir hetta, at áleið 23,5 m² verða lagdir afturat matr. nr. 19, meðan Eysturkommuna fær áleið 12,2 m² frá matr. nr. 19.

Verandi matr. nr. 19 er 350 m² til støddar. Við ætlaðu marknaðarumskipanini verður matr. nr. 19 áleið 361,3 m² til støddar.

Skjøl:

- 26-00118 – Fylgiskjal 1 – Gróvargøta 26
- Gróvargøta 26

**Fíggjarligar avleiðingar:**

**Tilmæli**

Umsitingin mælir til, at gera hesa marknaðarumskipanina.

**Byggi - og býarskipanarnevnd 18. marts 2026**

Byggi- og býraskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Fíggjarnevnd 28. apríl 2026**

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini

## 20/26 Umsókn um keyp av ískoytisstykki - Part av matr. nr. 37 í Syðrugøtu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 18.03.2026 | 13/26 | 26/00120-2 |
| 2 Fíggjarnevnd | 28.04.2026 | 8/26 | 26/00120-2 |
| 3 Býráðið | 29.04.2026 | 20/26 | 26/00120-2 |

**Málslýsing:**

Eysturkommuna hevur móttikið umsókn um keypa allan ella av parti av matr. nr. 37 í Syðrugøtu, dagfest 2. mars 2026.

Søkt verður um loyvi at keypa allan ella part av matr. nr. 37 í Syðrugøtu sum ískoytisstykki til matr. nr. 19 í Syðrugøtu. Matr. nr. 37 í Syðrugøtu er áleið 81 fermetrar til støddar.

**Lógir og ásetingar:**

Í kunngerð nr. 122 frá 22. desember 2000 um alment útboð av kommunalari fastogn í § 2, stendur:

**§ 2.** Fastogn nýtist tó ikki at verða boðin alment út, um talan er um

1. sølu til landsmyndugleikar, kommunu ella kommunalan felagsskap, sbr. § 57 í kommunustýrislógini,
2. sølu til felag, stovn v.m., sum kommunan lógliga kann veita stuðul,
3. sølu av økjum, ið eru minni enn 300 m² til víddar og sum tað ikki sjálvstøðugt kann ve á ella
4. kommunala útstykkingar o.l., har tillutan og prísáseting fara fram eftir frammanundan reglum.

*Stk. 2.* Við góðkenning frá landsstýrismanninum kann verða vikið frá kravinum um almen sambandi við makaskifti og tá tað annars eru serlig viðurskifti, ið tala fyri, at fastognin kan seld uttan alment útboð.

**Upplýsingar frá umsitingini:**

Matr. nr. 37 í Syðrugøtu liggur út móti høvuðsvegnum matr. nr. m. Um kommunan selur allan ella part av matr. nr. 37 í Syðrugøtu, fer kommunan ikki at hava møguleika at víðka vegin í framtíðini. Økið er frammanundan trongt og er merkt av lutfalsliga stórari ferðslu í Syðrugøta.

**Skjøl í málinum:**

- Gróvargøta 26

**Fíggjarligar avleiðingar:**

| **Tilmæli** |
| --- |
| Umsitingin mælir frá, at selja matr. nr. 37 í Syðrugøtu. |

**Byggi - og býarskipanarnevnd 18. marts 2026**
Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Fíggjarnevnd 28. apríl 2026**
Fíggjarnevndin mælkir til at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini

## 21/26 Tónleikasamtakið Grót 2026. Frágreiðing og tilmæli

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 27.04.2026 | 14/26 | 26/00145-2 |
| 2 Fíggjarnevnd | 28.04.2026 | 16/26 | 26/00145-2 |
| 3 Býráðið | 29.04.2026 | 21/26 | 26/00145-2 |

**Málslýsing:**

**Endamál við umsókn:**
At fáa fíggjarligan stuðul til at gjalda nýtsluna av føstum útreiðslum, sum Tónleikasamtakinum Grót hevur av at húsast í Tøting í Syðrugøtu.

Tøting verður brúkt dagliga av nógvum ymiskum tónleikarum, tað hevur við sær eina stóra meirnýtslu av EL, meira slit av okkara útgerð, ið er sera kostnaðarmikil, og má tí javnan endurnýggjast.

**Virksemi**:
Tónleikasamtakið Grót skipar fyri umleið 20-25 konsertum árliga, tað svarar til umleið 10-12 tiltøk, við minst tveimum bólkum hvørja ferð. Í gjøgnumsnitt eru umleið 4 tónleikarar í hvørjum bólki, og tað svarar til uml. 80-100 tónleikarar árliga.

Umbiðin upphædd: 60.000 kr.

**Fíggjarligar avleiðingar:**

Á fíggjarætlanini fyri 2026 eru 400.000 kr. settar av til rakstrarkonto 522, "Stuðul til mentan".
Herav eru per d.d. 400.000 kr. tøkar.

**Tilmæli**

### Mentanarnevndin 27. apríl 2026
Mentanarnevndin mælir til at stuðla umsóknini við 40.000 kr.

### Fíggjarnevnd 28. apríl 2026
Fíggjarnevndin  mælir til at taka av tilmælinum hjá mentnarnevndini

## 22/26 Leirvíks Páll skótarnir, 2026

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 27.04.2026 | 24/26 | 26/00169-2 |
| 2 Fíggjarnevnd | 28.04.2026 | 17/26 | 26/00169-2 |
| 3 Býráðið | 29.04.2026 | 22/26 | 26/00169-2 |

| Málslýsing: |
|---|
| Stuðulin er til dagligan rakstur og íløgu í útgerð og húsið. Ætlanin er at fara at stoypa ella asfaltera økið niðanfyri húsið, so at kanovognurin kann standa væl har.<br>Skótavirksemið er av stórum týdningi fyri nógv børn og ung í Eysturkommunu. Vikuliga savnast eini 80 børn og ung til ymiskar aktivitetir, ið stimbra tey sosialt og geva teimum nógvar praktiskar førleikar víðari í lívinum.<br><br>Fíggjarætlan í umsókn.<br><br>Umbiðin upphædd: 50.000 kr. |

| Fíggjarligar avleiðingar: |
|---|
| Á fíggjarætlanini fyri 2026 eru 400.000 kr. settar av til rakstrarkonto 522, "Stuðul til mentan".<br>Herav eru per d.d. 400.000 kr. tøkar. |

| Tilmæli |
|---|
| |

**Mentanarnevndin 27. apríl 2026**
Mentanarnevndin mælir til at ganga umsókníni á møti

**Fíggjarnevnd 28. apríl 2026**
Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini.

## 23/26 Satspulja 2026. Tvær útgávukoncertir í Eysturkommunu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 27.04.2026 | 2/26 | 26/00171-3 |
| 2 Fíggjarnevnd | 28.04.2026 | 18/26 | 26/00171-3 |
| 3 Býráðið | 29.04.2026 | 23/26 | 26/00171-3 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Í samband við debutútgávuna hjá Oð, ið Eyk stuðlaði, ynskir umsøkjarin at hava tvær útgávukoncertir í kommununi.<br>Konserptið er eitt akustisk surround.upplivilsi, har áhoyrarnir sita í miðjuni og verða umfevndir av teimum átta tónleikarunum. Hetta hevur verið gjørt fyrr, og afturmeldingarnar eru góðar.<br>Formatið gevur eina heilt serstaka uppliving, men avmarkar samstundis talið av áhpyrarum, og er tískil trupult at fíggja við atgongumerkjasølu einans.<br><br>Umbiðin upphædd:<br>Søkt verður um stuðul til 8 tónleikarar à 2.500 kr/stk * 2 = 40.000 kr. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Á fíggjarætlanini fyri 2026 eru 200.000 kr. settar av til rakstrarkonto 522, “Satspulja 2026”. Herav eru per d.d. 200.000 kr. tøkar. |

| **Tilmæli** |
|---|
| |

**Mentanarnevndin 27. apríl 2026**
Mentanarnevndin mælir til at veita stuðul áljóðandi 35.000 kr.

**Fíggjarnevnd 28. apríl 2026**
Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini.

## 24/26 Satspulja 2026. Tilfar til studiohøli

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 27.04.2026 | 8/26 | 26/00185-3 |
| 2 Fíggjarnevnd | 28.04.2026 | 19/26 | 26/00185-3 |
| 3 Býráðið | 29.04.2026 | 24/26 | 26/00185-3 |

**Málslýsing:**

Søkt verður um stuðul til at gera eitt tónleikastudio, ið skal opna við Gøtugjógv liðugt. Studioið skal hýsa virksemi við Eivør, Hamferð o.ø., Hølið er innrættað við kreativiteti fyri eyga – akustikkurin og útgerðin í rúminum skulu optimerast til at kunna samstarva um at skapa tónleik á høgum tekniskum og listarligum støði.

Tað er sera týdningarmikið fyri føroyskan tónleik at hava eitt slíkt stað at skapa tónleik í, og tað finst onki meira upplagt stað at leggja tað enn í Eysturkommunu. Eg eri longu fluttur inn í hølini og byrjaður uppá mítt virksemi. Í skrivandi stund eru vit í ferð við at leggja seinastu hond á næstu útgávuni hjá Eivør, sum eftir ætlan skal koma út seinni í ár. Harafturat eru fleiri verkætlanir bókaðar inn.
Málbólkurin fyri eitt slíkt studio er í fyrstu atløgu tann føroyski tónleikapallurin. Síðani at Studio Bloch stongdi er onki stað, har føroyskir tónleikarar kunnu savnast um at framleiða nýggjan tónleik. Ætlanin er eisini at hava eitt tilboð, sum er nóg sterkt til at kunna bjóða útlendskum tónleikarum hendavegin.

Eg havi longu gjørt íløgur í studioið, og tað er klárt at brúka. Tó hevði játtaður stuðul frá satspuljuni hjá Eysturkommunu givið mær møguleika til at gjørt karmarnar betri, soleiðis at góðskan kann hækkast og tað verður uppaftur meiri attraktivt hjá fólki at gera sínar upptøkur í Kapnas Sound.

Umbiðin upphædd: 50.000 kr.

**Fíggjarligar avleiðingar:**

Á fíggjarætlanini fyri 2026 eru 400.000 kr. settar av til rakstrarkonto 522, "Stuðul til mentan". Herav eru per d.d. 400.000 kr. tøkar.

**Tilmæli**

**Mentanarnevndin 27. apríl 2026**

Mentanarnevndin mælir til at veita stuðul áljóðandi 45.000 kr.

**Fíggjarnevnd 28. apríl 2026**
Fígjgarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini.

## 25/26 Rakstrarstuðul, Eysturskot 2026

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 27.04.2026 | 26/26 | 26/00186-2 |
| 2 Fíggjarnevnd | 28.04.2026 | 20/26 | 26/00186-2 |
| 3 Býráðið | 29.04.2026 | 25/26 | 26/00186-2 |

**Málslýsing:**

Í ár verður felagið 10 ár og tað eru fimm ár síðan byrjað varð úti á Vik. Skjúttarnir hjá okkum halda áfram at vinna, og eisini eru okkara skjúttar teir mest vinnandi í Føroyum higartil innan Trap skjóting.

Nú eru bingjur við at koma upp at standa, so vit kunnu innrætta okkum eitt lítð felagshølið. Vit hava stoypt fundament til at seta bingjurnar á og ein bingja er uppkomin. Ein til goymslu og so tvær sum vit ætla at byggja saman til felagsrúm. Ætlanin er at klæða tær við timburi sum skjótast. Vit søkja um stuðul og vóna at koma so langt við øllum nú í summar og so er meiningin at halda føðingardagin eisini.

Sláimaskina og uppsamlari eru komin, og tað eru vit sera glað fyri.

Umbiðin upphædd: 50.000 kr.

**Fíggjarligar avleiðingar:**

Á fíggjarætlanini fyri 2026 eru 400.000 kr. settar av til rakstrarkonto 522, "Stuðul til mentan". Herav eru per d.d. 400.000 kr. tøkar.

**Tilmæli**

**Mentanarnevndin 27. apríl 2026**
Mentanarnevndin mælir til at stuðla umsóknini við 40.000 kr.

**Fíggjarnevnd 28. apríl 2026**
Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini

## 26/26 Rakstrarstuðul, Eystanljóð 2026

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 27.04.2026 | 27/26 | 26/00187-2 |
| 2 Fíggjarnevnd | 28.04.2026 | 21/26 | 26/00187-2 |
| 3 Býráðið | 29.04.2026 | 26/26 | 26/00187-2 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Søkt verður um rakstrarstuðul hjá kórinum Eystanljóð fyri tíðarskeiðið september 2025 - juni 2026.<br>Eystanljóð var stovna í 1987 undir navninum Felagskórið Gøta/Leirvík og hevur síðani skipa fyri kórkonsertum og øðrum mentunarligum tiltøkum í serliga Eysturkommunu og eisni runt um í Føroyum. Endamál felagsins er lýst í viðtøkunum hjá kórinum og er: " § 2 Endamál felagsins er at fremja kórsang og at menna áhugan fyri kórsangi í Føroyum og uttanlands. Kórið luttekur eftir førimuni í heimliga mentanarlívinum. " Vit eru áleið 30 kórsangarar, har tey flestu eru úr Eysturkommunu, men eisini úr grannakommununum.<br><br>Virksemi hjá kórinum er ætla einum breiðum málbólki og er við til at ríka um mentunarlívi í kommununi.<br>Í várhálvuni 2026 liggur í kortinum:<br>At luttaka í føstugudstænastum<br>At skipa fyri vár konsert<br>At skipa fyri venjingarvikuskifti<br>At luttaka á Kórstevnuni á Kambsdali, har Eystanljóð fyriskipar stevnuna<br><br>Umbiðin upphædd: 59.500 kr. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Á fíggjarætlanini fyri 2026 eru 400.000 kr. settar av til rakstrarkonto 522, "Stuðul til mentan".<br>Herav eru per d.d. 400.000 kr. tøkar. |

| **Tilmæli** |
|---|
| |

**Mentanarnevndin 27. apríl 2026**
Mentanarnevndin mælir til at stuðla verkætlanini við 35.000 kr

**Fíggjarnevnd 28. apríl 2026**
Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini

## 27/26 Rakstrarstuðul, Losjan Glotti 2026

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 27.04.2026 | 28/26 | 26/00188-2 |
| 2 Fíggjarnevnd | 28.04.2026 | 22/26 | 26/00188-2 |
| 3 Býráðið | 29.04.2026 | 27/26 | 26/00188-2 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Losjan Glotti søkir um rakstrar- og viðlíkhaldsstuðul til virksemi og bygningin v.m.<br><br>Viðkomandi skjøl eru viðfest.<br><br>Umbiðin upphædd: Eingin ítøkilig |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Á fíggjarætlanini fyri 202 eru 400.000 kr. settar av til rakstrarkonto 522, “Stuðul til mentan”. Herav eru per d.d. 400.000 kr. tøkar. |

| **Tilmæli** |
|---|
| |

**Mentanarnevndin 27. apríl 2026**
Mentanarnevndin mælir til at stuðla umsóknini við 40.000 kr.

**Fíggjarnevnd 28. apríl 2026**
Fíggjarnevndin mælir til at taka undr við tilmælinum hjá mentanarnevndini

## 28/26 Eykajáttan apríl 2026 - 26/00225

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevnd | 28.04.2026 | 11/26 | 26/00225-2 |
| 2 Býráðið | 29.04.2026 | 28/26 | 26/00225-2 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Víst verður til fyriliggjandi yvirlit yvir íløgur og frágreiðing frá umsitingini.<br><br>Sum tað framgongur av fyriliggjandi yvirliti, so er talan um at veita eykajáttan á 1.520.000,00 kr., Allar eykajáttaninar eru til íløgur, sum vóru avsettar í fjør men sum ikki vóru gjørdar liðnar í fjør , men verða gjørdar liðnar í ár.<br><br>À býráðsfundinum tann 26. februar var samtykt at taka av tilboðið á 900 t.kr til liðugtgerð av tangahúsinum við skúlan í Leirvík, og er neyðugt at veita eykajáttan til hetta.<br><br>**Ískoyti 28. apríl 2026.**<br>Víst verður til fyriliggjandi skriv frá umsitingini (Aðrar viðmerkingar), har greitt verður frá at neyðugt er at veita eykajáttanir umframt omanfyristandandi á 4,2 mió. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| RLÙ verður 1,5 mió. betri enn ætla í 2025, men 2,4 mió. verri í 2026<br><br>**Ískoyti 28. apríl 2026**<br>RLÚ fyri 2026 verður 6,6 mió. verri í 2026 í mun til samtyktu fíggjarætlanina. |

| **Tilmæli** |
|---|
| Mælt verður til at veita eykajáttan samb. fyriliggjandi yvirliti, um framt ískoyti dagfest 28. apríl 2026. Altso á íalt 6,6 mió. |

**Fíggjarnevnd 28. apríl 2026**

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini, og veita eykajáttanir á íalt 6,6 mió. Peningurin verður tikin av innistandandi.

## 29/26 Umsókn um byggiloyvi - matr. nr. 120 í Syðrugøtu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 22.04.2026 | 15/26 | 26/00229-2 |
| 2 Býráðið | 29.04.2026 | 29/26 | 26/00229-2 |

**Málslýsing:**

**Uppruni til málið:**
Eysturkommuna hevur tann 22.04.2026 móttikið umsókn um útbygging av sethúsum á matr.nr. 120 í Syðrugøtu.

**Lýsing av málinum:**
Umsóknin fevnir um útbygging av verandi sethúsum á omanfyri nevnda matrikli.
Útbyggingin verður framd omaná verandi kjallara, ið er bygdur í mark, og umfatar eina víðkan á umleið 41,4 fermetrar í mun til verandi bygning.
Byggimarkið vendir út móti ánni, og frástøðan til grannahúsið er 13,3 metrar.

**Lógargrundarlag, ásetingar o.a.:**
Ognið er staðsett í einum B-øki, ið er lagt út til bústaðarendamál. Umsøkta útbyggingin er í samsvari við galdandi hæddaravmarkingar og byggistig, ið er ásett til 0,3. Eftir útbyggingina verður byggistigið 0,28.

**Skjøl í málinum**

- Byggiloyvi út á mark á matr 120 Syðrugøta

**Fíggjarligar avleiðingar:**

Ongar.

**Tilmæli**

Umsitingin mælir til at geva frávik til hesa útbygging.

**Byggi - og býarskipanarnevnd 22. april 2026**
Uni Rasmussen tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini.

Ann Fuglø tekur støðu á býráðsfundinum.

## 30/26 Val av hegnsýnisnevnd - 26/00238

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðið | 29.04.2026 | 30/26 | 26/00238-1 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Hesir eru spurdir og hava játtað at verða í hegnsýnisnevndini.<br><br>• Jóhannus Petersen, formaður<br>• Mikael á Reynatrøð<br>• Viktor Joensen |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| |

| **Tilmæli** |
|---|
| Mælt verður til at velja omanfyri standandi persónar í hegnsýnisnevndina. |

fundurin lokin

Per Martin Gregersen

Magnus Skoralíð

Hanna Jensen

Ann Fuglø

Heri Mikálsson

Pól í Skorini

Unn Jarnskor
Ellingsgaard

Tórur Didrik Djurhuus

Uni Rasmussen